TING-HELLAN

Bleyt og hørð virði í føroysku miðlunum:

# Rættir menn tíma ikki konufólkafjas



**TINGHELLUGREININ**
*Eftir Elin Heinesen*

**2. partur (av trimum)**

Fjølmiðlarnir avspeglað ein ótíðarhóskandi hugburð, sum ger alt ov stóran mun á kynunum, og sum økir um fordómarnar ímillum kynini. Hetta hevur eitt sera óheppið árin á samfelagskjakið - og í síðsta enda á samfelagsbúskapin.

Í grein seinasta vikuskifti vísti eg á, at tað tykist sum tey matematisk-logisku evnini fáa alt ov nógv pláss í føroysku fjølmiðlunum í mun til tað menniskjansliga, sum verður skumpað til viks, tá tær stóru samfelagsligu linjurnar skulu dragast. Tað 'bleyta' menniskjansliga hevur jú 'bara' týdning fyri privatlívið hjá tí einstaka - og hvønn rakar tað? Er hetta ikki ein persónlig sak? Skulu vit blanda okkum uppí tað?

Tað er týðiligt, at føroysk fjølmiðlafólk generelt hava ein ótta fyri at nerta við slíkt og heldur velja at gera tað, tey eru von við - halda seg til traditionella faktaupprekssing og mikrofonhaldara- og hagtals-journalistikk. Mátin, fjølmiðlarnir lesa verðina uppá, tykist týðiliga at vera ein leivd frá eini tíð, har samfelagsviðurskiftini vóru nøkur heilt onnur enn nú - har menn arbeiddu úti og tóku sær av tí fysiska tilfeinginum, meðan kvinnurnar arbeiddu heima og tóku sær av tí psykiska tilfeinginum.

Men nú er samfelagið munandi broytt. Bæði menn og kvinnur arbeiða úti og eru produktiv á arbeiðsmarknaðinum, og bæði menn og kvinnur taka sær av húsarhaldinum og børnunum har heima. Men í føroyskum fjølmiðlum, verður enn tað, sum fyrr var roknað sum 'hørð' mannlig virði, hildið at vera mest relevant, meðan tað, sum fyrr vanliga var roknað sum tey 'bleytu', kvinnuligu virðini, ikki hevur sama áhuga. Tíðin er komin til at gera upp við henda hugsunarháttin um, hvat hevur týdning at bera fram í fjølmiðlum og hvat ikki.

### Finnast serlig kvinnulig og serlig mannlig virði?

Tað er eingin ivi um, at ávísur munur er á kvinnum og monnum og áhugamálum teirra, serliga har sum korini eru ymisk enn fyri kvinnur og menn. Men korini hjá kynunum eru sum sagt ikki so ymisk longur, sum tey vóru fyrr, á so nógvum økjum, og tí eru felags áhugamálini eisini fleiri. Politikkur, vinnulív og fíggjarligir spurningar eru eisini partur av gerandisdegnum hjá kvinnum í dag - ikki bara hjá monnum. Og menn halda sjálvandi familju- og kenslulív verða áhugavert - eins og kvinnurnar - tí teir spæla eisini ein størri leiklut heima við hús í dag.

Tað er eingin onnur orsøk enn traditión og vanahugsan til at býta kynsligu áhugamálini upp so harðliga í 'bleyt' (traditionelt kvinnulig) virði, og 'hørð' (traditionelt mannlig) virði. Hetta eru jú bara orð, sum púrt ongan konkretan týdning hava, tá samanum kemur. Orðini leggja virði aftrat nøkrum hugtøkum, sum bara eru til í hugaheimi okkara, men ikki nakra aðrastaðni. Tað er jú so vælsignað einfalt at býta verðina upp soleiðis í pør av tveimum - hart yvir fyri bleytum, fýrakantað yvir fyri rundum - og síðani hefta hesi hugtøkini upp á hvør sítt kyn, soleiðis at vit enda við at síggja kvinnur og menn sum mótsetningar. Men... hevur hetta nakað við veruleikan at gera?

### Fordómar sjálvstyrkjandi ávirkan

Tað er synd og spell at býta verðina soleiðis upp, tí uppbýtingin ger okkum blind fyri tí, vit hava til felags sum menniskju - kvinnur og menn. Hugsunarhátturin fær nevniliga menn at halda, at teir eiga bara at hava áhuga fyri 'mannligum' matematiskt-logiskum evnum, tí annars eru teir ikki rættiligir menn - ja, teir eru nærmast foyir, um tað verður avdúkað, at teir hava áhuga fyri øðrum eisini, tí hugsa sær, um onkur skuldi hildið, at teir vóru 'av hinum slagnum'! Og hugsunarhátturin fær hin vegin kvinnur í sínum lag at halda, at tær eiga bara at hava áhuga fyri 'kvinnuligum' bleytum evnum, tí annars eru tær ikki rættiligar kvinnur!

Menn halda seg bara fáa status við at vísa, at teir vita nakað um politikk, búskap, heimsspeki og tílíkt og við at vera útetirvendir og hugsa stórt og globalt. Meðan kvinnurnar fáa status við at hava innlit í viðurskifti, sum hava við sjálvsinnlit, kærleika, umsorgan og kensluligt samskifti at gera. Hesin hugsunarháttur fær harumframt kynini til serliga at dyrka hesi virði, og elvir til eina sjálvforstyrkjandi ávirkan og til øktar fordómar millum kynini. Og tá tað jú mest eru menn, sum sita í leiðandi størvunum í fjølmiðlunum, speglast teirra hugsunarháttur eisini mest aftur í fjølmiðlaheiminum.

### Hvat hava kynini til felags?

Tað syrgiliga er, at hetta slettis ikki hongur saman við veruleikanum í gerandisdegnum hjá teimum allarflestu. Sum menniskju hava kynini nógv meira til felags, enn henda uppbýting letur okkum halda. Eitt og hvørt menniskja - kvinna sum maður - stendur í roynd og veru fyri júst teim somu lívsspurningunum - hørðum so væl sum bleytum. Vit hava øll somul kenslur, familju, vinir, húsarhald og kanska eisini eitt yrki, samstarvsfelagar, peningarligar trupulleikar osfr. Øll elska síni børn og øll ynskja at skapa sær eitt so gott lív fyri seg og síni sum gjørligt.

Alt, sum hendir í samfelagnum hongur meira og minni saman. Og alt hevur í ein ella annan mun týdning fyri lív okkara - frá altjóða fiskaríavtalum til, hvussu lítlibeiggi hevur tað í vøggustovuni. Frá tí almenna til tað persónliga. Og tað líka mikið, um tú ert kvinna ella maður. Og kortini verður farið øgiliga lætt um stórar partar av lívinum hjá báðum kynum - tey persónligu evnini - sum um tey ongan samfelagsligan týdning hava.

### Hví eru so fá konufólk í politikki?

Fjølmiðlarnir hava eina ábyrgd at ganga framman við upplýsing. Tað er her, vit fylgja við í samfelagslívinum. Tað er her, vit spegla okkum og verða vegleidd. Tí er tað gott og neyðugt, at samfelagsbúskapur, politikkur og vinnulív verða viðgjørd í fjølmiðlunum. Men tað er stórt spell, at persónlig, men tó alment menniskjanslig evni, sum hava við tað gerandisliga, kensluliga, nærumhvørvisliga og trivnaðin at gera hjá okkum øllum, verða skýrd at vera 'bleyt' og tí bara hoyrandi til áhugamál hjá tí eina kyninum - og ikki hjá báðum.

Hetta speglast aftur í samfelagsliga kjakinum í tí politiska lívinum í Føroyum, sum byggir á somu einoygdu og ótíðarhóskandi uppbýting og skeivdeiling. Her tosa vit aftur um eina sjálvforstyrkjandi ávirkan. Miðlarnir dyrka bara nøkur ávís evni, sum politikkarnir síðani meta vera tey týdningarmestu at taka til viðgerðar í politiskum bólki - sum aftur førir við sær, at miðlarnir mugu viðgera júst tað evni, tí tað er aktuelt í tinginum.

Ei undarligt í, at lutvíst so fá konufólk í Føroyum tíma at fara upp í politikk. Fleiri og fleiri viðurkenna, at eisini annað enn skip og vegir fáa samfelagshjólini at mala, men verður hetta "annað" tikið uppá tungu í almennum politiskum bólki í Føroyum, verður tað antin tagt burtur ella kveistrað av vegnum, tí "her í løgtinginum (býráðnum, bygdaráðnum) viðgera og kjakast vit fyrst og fremst um verulig mál!" Og verulig mál eru fiskivinna, tunnilsgerð, havnarløg og tílíkt! Alt annað er - groft sagt - fjant og petitessur, sum bara bleyt konufólk ganga uppí - og ikki rættiligir menn!

### Skomm at tosa um trivnað?

Nær hevur tú seinast hoyrt mannligar politikkarar í álvara brúkt krút uppá at kjakast sínámillum um at bøta um korini á ellisheimum (ikki uttan so teir verða øgiliga hart trongdir!). Ella hvussu neyðugt tað er við uppnormeringum í barnagørðum og skúlum, fyri at børn okkara ikki skula mistrívast. Ella hvat gerast kann fyri at økja um trivnaðin hjá ungum, so vit ikki missa tey á gólvið, og tey enda við at gerast misbrúkarar ella gera sjálvmorð? Slíkt mugu konufólk (ella samkynd og kanska religiónsfanatikarar) taka sær av. At síggja til tora mannfólkini ikki. Tað tykist tíanverri sum um, at teir halda tað vera skomm, um ein maður ger slík mál til síni hjartamál. Og tá so lutvíst fáar kvinnur eru uppi í politikki, verða slík evni ofta skammiliga forsømd - eisini í fjølmiðlunum.

Tað syrgiliga er, at væntandi viðurkenningin av veruliga samfelagsliga leiklutinum evni sum trivnaður, umsorgan, nærumhvørvi, kenslulív og tílíkt t.d. hava, gongur tíverri út yvir øll - ikki bara kvinnurnar, men eisini menninar í stóran mun. Vit hava øll eitt lív uttanfyri arbeiðsplássið - eitt lív, har vit t.d. fáa børn og gerast sjúk og gomul. Øll kunnu persónliga koma til at uppliva trupulleikarnar, tá vit t.d. hava brúk fyri hjálp frá tí almenna, og umstøðurnar fyri hjálpini ikki eru tær best møguligu, og vit enda á einum alinlongum bíðilista. Hvussu stuttligt er tað? Men hin vegin - hvussu skulu vit vita, hvussu sovorðið veruliga kennist fyri tey raktu, tá vit heldur ikki síggja/lesa/hoyra um tað í fjølmiðlunum?

Í síðsta enda gongur hesin ótíðarhóskandi hugburður eisini út yvir búskapin í samfelagnum og ger okkum til eftirbátar - ikki minst á vinnuliga/búskaparliga økinum! Henda áhugaverda pástandin vil eg fegin útgreina betur í næstu grein míni, sum kemur í næsta vikuskifti.




## Fakta

Elin Heinesen býr í Keypmannahavn, har hon er ábyrgdarhavandi blaðstjóri fyri blaðið KIWI magazine - eitt mánaðarblað við 430.000 lesarum iflg. Gallup/Dansk Oplagskontrol 1. og 2. kvartal 2005.